**Tíðindastubbi 1: Bæði á heimasíðu og sum mail**

**Bókingar um ársskiftið**

**Fíggjarárið 2020**

Bókingar, sum skulu við í 12. tíðarskeið í 2020, skulu hava bókingardagfestingina

27.12.2020

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin ”GL Date” verða inntøppað ”27.12.2020” (ella lægri, tvs. 1. til og við 27. desember 2020) ella ”12-20”.
- Í høvuðsbók skal í teiginum ”Period” verða inntøppað ”12-20”.
- Aðrar góðkendar búskaparskipanir, sum senda inn upplýsingar via webservice, skulu brúka bókingardagfestingina 27. desember 2020.

Minnist til ikki at brúka dagfestingarnar 28., 29., 30. og 31. desember sum ”GL Date”.

Tá ið 12. tíðarskeið í 2020 verður latið aftur, boðar Gjaldstovan, á heimasíðuni, frá, hvussu skrásett tá skal verða uppá 1. ískoytisskeið 2020 (tíðarskeið 13-20).

**Fíggjarárið 2021**

Um ávísingar skulu bókast fyri fíggjarárið 2021, verður ein dagfesting í januar 2021 sett í teigin

”GL Date”,

t.d. ”05.01.2021”.

- Í kreditor-, verkgongdar- og debitoraskipanini skal í teigin ”GL Date” verða inntøppað t.d. ”05.01.2021” ella ”01-21”
- Í høvuðsbók skal í teiginum ”Period” verða inntøppað ”01-21”.

---

**Tíðindastubbi 2: bæði á heimasíðu og sum mail**

**Eyðmerking av skjølum, sum verða send Gjaldstovuni at skráseta**

Við ársskiftið 2020/2021 er týdningarmikið, at stovnarnir týðiliga eyðmerkja skjølini, teir senda Gjaldstovuni at skráseta – tað veri seg lønarumbønir, kreditorfakturar e.a. – á rætta fíggjarár, ávikavist ”2020” og ”2021”.